VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av vestri, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Um kvøldið framvegis hvassur vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið mikudagin:
Fyrrapartin hvassur vindur av útsynningi og regn, seinnapartin minkar hann vindin av vetri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið hósdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

Veðrið fríggjadagin og leygardagin:
Fríggjadagin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt, men um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind og regn. Leygardagin minkar hann vindin av útsynningi og væntandi turt. Hitin millum 13 og 17 stig.

DAGSINS FERÐAFÓLK

10 tímar um at lenda

Familjan Jansen eru og ferðast saman við vinkonuni Barbaru Rubek Nielsen. Barbara hevur føroyska mammu, men hon er uppvaksin í Danmark. Hon tosar danskt men skilir føroyskt. Hon hevur nú tikið vinfólkini Theis Jansen, Mette Jansen og lítla sonin hjá teimum Emil Jansen við til Føroya.

Barbara hevur verið tríggjar ferðir í Føroyum, meðan tað fyrstu ferð hjá Jansen familjuni.

Hvar eru tit frá?
Vit eru danskarar og búgva í Nørrebro í Keypmannahavn.

Ferðast tit nógv?
Ja, eitt sindur. Vit ferðast um summarið og um veturin og ofta enn meira enn tað eisini. Vit hava verið í Teilandi, USA, Kina og aðrar staðir. Vit fara har, sum vit kunnu uppliva náttúruna, tí at eg tími ikki at liggja á strondum, sigur Theis. Her í Føroyum er náttúran framúr, og tað er stuttligt at uppliva nakað annað enn tað flata landslagið, vit eru von við í Danmark.

Hvussu er í Nørrebro? Er tað nakað, sum tit saknað í Føroyum í mun til Nørrebro?
Tað haldi eg ikki. Vit komu upp her fyri at uppliva nakað øðrvísi, og tað haldi eg eisini, at vit hava gjørt, sigur Mette. Um eg skal nevna nakað, so er tað kanska internet samband. Vit búgva í einum húsum á Toftum, og har er einki internet samband, sigur Barbara.

Hvat vóna tit at fáa burturúr tíðini í Føroyum?
Eg vóni, at eg sleppa at klatra og kava. Eg fari altíð eftir náttúru-upplivingum, og tað hevði verið sera spennandi, sigur Theis.

Vit hava longu upplivað nógv. Millum annað tók tað okkum 10 tímar at lenda orsakað av mjørka. Vit hava bara møtt vinarligum fólki, og tað hevur verið ótrúliga jaligt. Tú mást endiliga skriva, at føroyingar eru ótrúliga hjálpsamir, sigur Mette. Um vit eru vilst, so skulu vit bara síggja eitt sindur spyrjandi út, og so kemur onkur yvir og spyr, um vit hava brúk fyri hjálp, siga tey øll við einum smíli.

Hava tit fylgt við HM?
Nei, men vit sóu endan av finaluni. Tað var sera spennandi. Spell at Zidane skuldi gera hatta. Tað var ein sera keðiligur máti at enda sína yrkisleið sum fótbóltsspælari við einum reyðum korti, heldur Barbara.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	13
Qaqortoq	9
Ammassalik	4
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	9
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	11
Lerwick	13
Aberdeen	16
London	22
Tromsø	--
Bergen	16
Oslo	--
Stokkhólm	26
Keypmannah.	21
Helsinki	26
Moskva	28
Berlin	22
Warzawa	31
Kiev	26
Bukarest	27
Paris	23
Madrid	33
Róm	26
Malorca	29
Athen	27
Malta	29
Tunis	30
Beijing	25
New Dehli	27
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	14
New York	27
Miami	28
Los Angeles	25
Meksikobýur	--
Panama	29
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	16

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 998 hPa. vestan fyri Írland fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar týsnáttina.



Í dag:
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týskvøldið

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 8/7 kl. 06^{00}– 9/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0 mm – mált frá 6/7 kl. 06^{00}– 9/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juli: 22,3 mm

VESTFALLSKYRRINDI

11. juli Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
10. Juli	06.37	19.05	05.37	18.05	05.52	18.20	08.37	21.05	09.37	22.05	04.52	17.20	03.52	16.20	06.52	19.20	07.52	20.20	06.22	18.50	07.37	20.05
11. Juli	07.33	20.00	06.33	19.00	06.48	19.15	09.33	22.00	10.33	23.00	05.48	18.15	04.48	17.15	07.48	20.15	08.48	21.15	07.18	19.45	08.33	21.00
12. Juli	08.27	20.52	07.27	19.52	07.42	20.07	10.27	22.52	11.27	23.52	06.42	19.07	05.42	18.07	08.42	21.07	09.42	22.07	08.12	20.37	09.27	21.52
13. Juli	09.18	21.42	08.18	20.42	08.33	20.57	11.18	23.42	-	12.18	07.33	19.57	06.33	18.57	09.33	21.57	10.33	22.57	09.03	21.27	10.18	22.42
14. Juli	10.07	22.30	09.07	21.30	09.22	21.45	-	12.07	00.42	13.07	08.22	20.45	07.22	19.45	10.22	22.45	11.22	23.45	09.52	22.15	11.07	23.30

www.sosialurin.fo

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

GEVID BLÓÐ

5 707265 100029 >